

Andrew-boripallurin hjá BP í Norðsjónum. Mynd: BP

# Oljuprísurin fór undir 50 dollarar í morgun

**Jógvan Hugo Gardar**
07.01.2015 - 08:38

Oljan.fo

Í morgun gleið oljuprísurin niðurum enn eitt mark, tá prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent eina løtu kostaði 49,93 dollarar fyri fatið. Prísurin er nú farin eitt vet uppaftur til 50,10 dollarar fatið.

Oljuprísurin hevur ikki verið niðanfyri 50 dollarar fyri fatið síðani fíggjarkreppuna í 2009.

Nú liggur oljuprísurin væl nivanfyri helvtina av 115,62 dollarar, ið var hægsti oljuprísurin í 2014.